# Føroyingar fagnaðu McCartney



*Gissur, Ingrid, Jóngerð og Birgir á konsert hjá Paul McCartney í Parkini*

**Hundraðtals føroyingar lupu avstað, tá tey frættu, at Sir Paul McCartney skuldi hava konsert í Keypmannahavn. Fríggjakvøldið var stóra slagið, og vit hava hitt tríggjar teirra eftir konsertina. Gissur Patursson, Niclas Johannesen og Birgir Kruse vóru ovfarnir**

SIR PAUL Í PARKINI
*Ingi Rasmusssen*

Upp undir konsertina hjá Paul McCartney fríggjakvøldið suðaði Keypmannahavn av spenningi. Inni á matstovum, á Strøjnum og í Nýhavnini hoyrdi tú fólk siga, at tey vóru komin á konsert. Úr Jútlandi. Úr Noregi, Svøríki og Íslandi. Og úr Føroyum.

Hundraðtals føroyingar hava brúkt fleiri túsund krónur tilsamans at síggja meistaran, tá hann legði leiðini framvið. Og teir angra tað ikki. Vit hava fregnast hjá nøkrum teirra eftir konsertina fríggjakvøldið.



*McCartney er ein leiðarastjørna, heldur Birgir Kruse, sum stóð fáar metrar frá meistaranum í Parkini*

### Eina bússu til Paul

Gissur Patursson, sum hevur handilin »3-arin«, fór til Danmarkar saman við konuni og fleiri vinfólkum. Hann nýtti konsertina í djúpari andakt.

– Konsertin var heilt einastandandi. Eg havi ongantíð verið so friðarligur sum bæði undir og aftaná konsertina. Tað var heilt óveruligt. Paul McCartney var genialur. Super!

Gissur og vinfólkini høvdu fyrireikað seg væl til konsertina, so tey fingu sum best burturúr. Hin navnframi HB-arin, Eirikur Rasmussen, sum er inkarneraður Beatles- og Liverpool-viðhaldsmaður, hevði skaffað atgongumerkini í góðari tíð, og tað ráddi um bæði at hoyra og síggja so væl sum gjørligt.

– Vit høvdu kikara við, so vit fingu eisini hugt væl og virðiliga eftir bólkinum. Hann var stak góður og serliga trummusláarin var genialur. Vit sótu á 8A, sum er uppi við síðuna, so vit hoyrdu eisini væl. Ljóðið var sera gott, og tað rann ikki saman, sum tað onkuntíð ger við so stórar konsertir, sigur Gissur.

Persónliga var hæddarpunktið, tá sangur nummar 30 á konsertini fekk túsundtals tendrarar á loft.

– Mín persónligi favorittur er Let it Be. Tá hann kom, krassjaði fullkomiliga hjá mær, sigur Gissur Patursson, sum viðgongur, at nógvar kenslur bylgdust inn í honum..

Hetta var eisini eitt upplivilsi, sum hann hevur sæð fram til í nógv ár.

– Eg og konan hava í fleiri ár havt ein bússu til Paul McCartney og Eric Clapton, um teir skuldu komu hendanvegin. Nú bleiv tað til Paul McCartney, og tað passaði mær væl. Eg havi altíð elskað Beatles, og serliga Paul McCartney. Tað var antin Stones ella Beatles, tá eg var ungur. Eg átti allar beatlespláturnar. So hetta var stórt.

### Totalt imponerandi

Niclas Johannesen er tónasmiðurin, sum bæði er vorðin kendur fyri at skriva tónleik til Skeyk, hitt til Brand Enni og harðan rock saman við Chase. Hann var saman við sínum sangfugli Lenu Andersen farin á konsert hjá Sir Paul.

– Er tað ein av øllum teimum gomlu klassikarunum, sum eg vildi sleppa á konsert hjá, so er tað Paul McCartney. Lennon-McCartney eru ein fyrimynd hjá øllum tónleikarum, og serliga McCartney hevur skrivað nøkur av teimum bestu løgunum, ið eru til, sigur Niclas Johannesen.

Vit fylgjast av konsertini inn ímóti býnum, og tað suðar av fólki. Fantastiskt, hoyrist aftur og aftur, og tað eru eisini orðini hjá Niclas.

– Eg helt konsertin bleiv betri og betri, sum hon leið. Hon byrjaði væl, men seinna helvt var heilt fantastisk. Vit sótu nokk so aftarlaga, og tað var tað einasta minussið reint ljóðliga. Men tað kundi faktiskt gera tað sama, tí tað var heldur ikki poengið. Onkursvegna ráddi tað bara um at vera har, sigur Niclas.

Hann fær ikki peikað á nakran yndissang hjá Beatles ella Paul McCartney. Heldur ikki hetta kvøldið var nakað ávíst hæddarpunkt. Har vóru snøgt sagt ov nógv.

– Tað er júst trupulleikin við honum. Hann hevur simpulthen gjørt so nógv gott, at tað ber ikki til at nevna nakran favoritt-sang. Har vóru nógv, øgiliga nógv góð løg, sigur Niclas.

Tey bæði Lena og Niclas sótu bara friðarliga og lurtaðu.

– Vit kenna øll løgini og sótu bara og nýttu tað. Kanska eitt sindur av fjáltri. Ein hetja er ein hetja, óansæð hvussu gamal tú ert blivin, sigur Niclas.

Hóast Paul McCartney er komin upp í árini, vísti hann seg at vera væl fyri, og tað undraði Niclas.

– Eg var totalt bilsin av, at hann orkaði so væl. Hann syngur nógv betri nú enn fyri 10 árum síðan. Tá virkaði hann eitt sindur slitin, men nú er hann helst komin í form av turnéini í USA, og hann syngur næstan sum í ungum døgum. Hann syngur í sama tónalagi, í sama tempo. Einki tvætl. Og tað er totalt imponerandi av einum 60 ára gomlum manni, sigur Niclas.

### Ein leiðarastjørna

Birgir Kruse er serliga kendur fyri sítt mentanarliga starv. Og nú hann hevur verið á konsert við Paul McCartney, samanber hann Sir Paul við ein grundleggjara av tí partinum av mentanini, sum eitur rokktónleikur. Og tað var stórsligi at uppliva.

– Tá vit tosa um nútíðar rokktónleik, so eru beatlarnir grundlógarnevndin. Síðani Hank Williams hevur eingin sum beatlarnir definerað rokktónleik á plátu. Til innhalds og í tónagongd. Eingin ivi. At møta helvtini av livandi Grundlógarnevdini er stórt. Og at syngja na-na-na-na kórið í Hey Jude nakrar metrar frá Sir Paul í Parkini er enn størri, sigur Birgir Kruse, sum stóð heilt frammi við pallin, tá konsertin kókaði yvir.

Í góðum føroyskum ferðalagi upplivdi hann hetta fríggjakvøldið. Nakrar metrar frá meistaranum Paul.

– Ein meistari er hann, tí hann hevur skapt størstu klassikarararnar í nýggjaru rokksøguni á plátu og er enn frammi. Hevur ikki narkotiserað seg í hel, ella á annan hátt latið seg slúka upp av destruktivu undirhaldsmaskinuni. Undir teim hevjaðu eygnabrúnum stara sakleysu Bambi-eyguni okkum enn beint ímóti. Har er eingin slingur í valsinum, sigur Birgir Kruse.

Eisini hann var imponeraður av stórforminum hjá 60-ára gamla Paul McCartney.

– Útvið tríggjar tímar av undirhaldi av bestu skuffu uttan ein sjónligan sveittadropa, tað gerst ikki betri av einum, sum nærkast eftirlønaraldri í poppverðini. Eitt lýsandi eksempul. Ein leiðarstjørna. At honum ikki dámar grind, leggi eg líka í. Paul skal verða vælkomin aftur í Verðina.



# Samvitskan fekk meg at siga nei

**– Men Páll á Reynatúgvu sigur ósatt, tá hann letst ikki at hava hoyrt míni sjónarmið fyrr, sigur Finnur Helmsdal, sum longu undir 1. viðgerð boðaði flokkinum frá, at hann ikki tók undir við at taka av stuðulin til uppihaldspening**

POLITIKKUR
*Eirikur Lindenskov*



*– Eg havi fyri langari tíð síðani boðað bæði Páll á Reynatúgvu og Høgna Hoydal frá støðu míni, at eg ikki kundi taka undir við uppskotinum. Eg bað Høgna Hoydal um at fáa málið tikið upp í flokkinum, men einki hendi, sigur Finnur Helmsdal*

Tað var samvitskan hjá Finni Helmsdal, sum forðaði honum at atkvøða fyri uppskotinum hjá Pálli á Reynatúgvu um at taka av lógina um stuðul til uppihaldspening, ið fráskild skulu rinda fyrrverandi maka ella ógift skulu rinda børnum hjá sær undir 18 ár. Mikil orðadráttur stóðst í løgtinginum fríggjadagin, tá Finnur Helmdsdal, sum hevur sæti á tingi sum varamaður fyri Annitu á Fríðriksmørk, noktaði at atkvøða fyri uppskotinum hjá Páll á Reynatúgvu.

– Eg havi ikki samvitsku at atkvøða fyri einum slíkum uppskoti, sum ger tað fíggjarliga tyngri hjá einum bólki, sum frammanundan hevur tað tungt, sigur Finnur Helmsdal, sum als ikki skilir grundgevingarnar hjá meirilutanum í Trivnaðarnevndini.

Meirilutin í Trivnaðarnevndini (Jørgin Niclasen, Jenis av Rana, Rúni Hentze, Marjus Dam og Alfred Olsen) siga m. a. í álitinum, at »meirilutin fegnast um, at uppskotið javnstillar gift og ógift soleiðis, at tað ikki verður ein fíggjarligur ófyrimunur at liva saman gift«.

– Tað einasta, sum eg fái burtur úr hasum er, at nøkur fólk, sum kanska av átrúnaðarligum orsøkum eru trælabundin í einum hjúnarbandi, sum tey vilja sleppa burturúr, nú kunnu gnýggja sær í hondunum, tí onnur nú verða verri fyri. Har er als eingin logikkur í hasum setninginum, segði Finnur Helmsdal í løgtinginum fríggjadagin.

Hann heldur, at hesin margháttligi setningurin varð funnin, tí at meirlutin eingi verulig argument hevði fyri at samtykkja uppskotið.

### Finnur hevur persnónlig motiv

Tá Finnur Helmsdal boðaði frá støðu síni í løgtinginum, boðaði Páll á Reynatúgvu, landsstýrismaður frá, at hann tók uppskotið aftur. Men samstundis nýtti hann høvi frá tingsins røðarapalli at harta Finn Helmsdal.

– Hetta líkist einum mis-áliti, og mær tykir tað ógvuliga løgið, at ein varaløgtingsmaður kemur við so sterkum ákærum, og at hann kemur við hesum so seint í forløpinum, segði Páll á Reynatúgvu.

Víðari segði hann, at hann helt, at Finnur Helmsdal hevði persónlig motiv til at handla á henda hátt, og at hann vildi baka sína egnu kaku.

– Tað er einki at ivast í, at Finnur Helmsdal heldur enn fegin vildi sitið í landsstýrissessinum, sum Páll á Reynatúgvu situr í, segði landsstýrismaðurin, og legði afturat, at gerðin hjá Finni Helmsdal luktaði av øvund.

### Finnur hevur boðað frá

Men tað passar ikki, at Finnur Helmsdal ikki hevur boðað frá støðu síni í góðari tíð.

– Eg havi fyri langari tíð síðani boðað bæði Páll á Reynatúgvu og Høgna Hoydal frá støðu míni, og bað Høgna Hoydal um at fáa málið tikið upp í flokkinum, men einki hendi, sigur Finnur Helmsdal.

Tað harmar Finn Helmsdal, at lokal áhugamál altíð verða tikin framum, tá sparingar skulu finnast. Hann sigur, at landsstýrismenn o. o. sálda fyrst tað frá, sum gevur teimum atkvøður, og tí verður spart eitt nú á hesum øki, har fólk frammanundan eru illa fyri og illa fáa vart seg. Her er tað, at samvitskan hjá Finni Helmsdal sigur stopp.

Finnur Helmsdal sigur, at hann veit dømi um menn, sum rinda einar 50.000 kr árliga í uppihaldspeningi. Hjá teimum merkir tað, at 25.000 krónur í einum verða tiknar.

– Tað er ikki rímuligt, og er tað so, at tað kortini er politiski viljin, at hesin stuðul ikki skal latast, so hevði tað verði rímuligt at tikið hann í stigum, heldur Finnur Helmsdal.

Finnur Helmsdal er heldur fáorðaður, tá vit spyrja hann um brikslið um, at hann er fornermaður.

– Eg tími ikki at úttala meg um hatta, fólk kunnu sjálv meta um, hvat tey halda um Páll á Reynatúgvu, og tað hann, hann ger. Men eg eri als ikki fornermaður, eg havi tað fínt, havi eitt gott starv.

Finnur Helmsdal viðgongur, at hann helt seg vera eitt boð upp á landsstýrismann, men at flokkurin valdi nakað annað, og tað er so tað. Hann leggur skemtandi afturat, at nógvir øvundaðu Richard Burton, tá hann fekk Elizabeth Taylor…

Upp á fyrispurningin um støðu sína í Tjóðveldisflokkinum eftir hetta, sigur Finnur Helmsdal, at var hon ring áðrenn, so verður hon verri nú.

Finnur Helmsdal er ikki tingmaður meira, tí nú hevur Annita á Fríðriksmørk tikið sætið aftur. Hon hevur verið í barnsburðarfarloyvi síðani 19. februar.

# Tjóðveldisflokkurin má finna 10 mió krónur

**– Tjóðveldisflokkurin breyt gjørdar samgonguavtalur á tingfundinum fríggjadagin. Hetta kostar landskassanum 10 milliónir krónur, og tær sparingarnar eigur Tjóðveldisflokkurin at finna á sínum egnu málsøkjum, heldur Fólkaflokkurin**

POLITIKKUR
*Eirikur Lindenskov*



*Óli Breckmann og hini í Fólkaflokkinum mæla nú Høgna hoydal til stjótt at tryggja innanhýsis floksaga í Tjóðveldisflokkinum, so flokkurin megnar at liva upp til at »geva samgonguni ein seinasta kjans«, sum Høgn Hoydal fleiri ferðir hevur sagt*

Fólkaflokkurin leggur nú trýst á Tjóðveldisflokkin, og biður formann floksins, Høgna Hoydal, nú fáa skil á sínum tingmonnum.

Hetta hendir í kjalarvørrinum av, at Tjóðveldisflokkurin breyt tvey samgongulyft fríggjadagin, sambært Óla Breckmann, formanni Fólkafloksins á tingi.

Óli Breckmann hevur tí skrivað Høgna Hoydal eitt bræv.

– Vit halda tað vera sjálvsat, at Tjóðveldisflokkurin innan egin málsøki finnur somu upphæddir, sum tær, ið orsakað av avtalubrotunum koma til útgjaldingar í ár, so at hesar eykajáttanir verða útreiðsluneutralar fyri landskassan, sigur Óli Breckmann.

Hann sipar til tær o. u. seks milliónirnar, sum ætlanin var at spara við uppskotinum hjá Páll á Reynatúgvu, landsstýrismanni, við at taka av stuðulin til uppihaldspening, og uppskotið hjá Jacob Vestergaard, landsstýrismanni í fiskivinnumálum um mánaðarligan minstaforvinning til útróðrarmenn. Hetta skuldi spart landskassanum o. u. fýra milliónir.

Tilsamans kostaðu avtalubrot Tjóðveldisfloksins, sambært Óla Breckmann, landskassanum 10 mió, og hann heldur tað verða sera órímuligt, um hetta skal ganga út yvir málsøkini, sum Fólkaflokkurin umsitur í landsstýrinum.

– Tjóðveldisflokkurin brey gjørdar samgonguavtalur og helt tingið fyri gjøldur við at skifta støðu og kúvenda í málum, tá atkvøtt varð, stikk ímóti tí, hann hevði avrøtt og enntá undirskrivað við aðrar flokkar og tingmenn, sigur Óli Breckmann.

– Vit vóna, Tjóðveldisflokkurin skjótt klárar at tryggja innanhýsis floksaga til at »geva samgonguni ein seinasta kjans«, sum formaður floksins alment tók til, tá hann setti seg í sessin sum landsstýrismaður í mentamálum, sigur Óli Breckmann.

# Tingmaður kært landsstýrismann fyri løgmann

Finnur Helmsdal, tingmaður í Tjóðveldisflokkinum hevur kært atburð hjá landsstýrismanninum Páll á Reynatúgvu fyri løgmann. Í grein í blaðnum í dag (síða 27) skrivar Finnur Helmsdal, at hann fríggjadagin skrivaði løgmanni bræv sum landsins hægsta umsitingarliga leiðara og upplýsti um tað, Páll á Reynatúgvu hevði sagt um seg og sítt arbeiðspláss, aftaná at hann hevði hunddálkað seg á tingsins røðarapalli. Finnur Helmsdal skrivar m.a.: -Tá Páll á Reynatúgvu heldur fram við sínum átálmaða perfiditeti og annars at koma við ósannindum um bæði meg og málið, so haldi eg tíðin er komin at siga eitt sindur meira skrivar hann og vísir á, at landsstýrismaðurin í tinginum kom við meira og minni fjaldum hóttanum móti sær, sínum starvi og arbeiðsplássi. Og hann heldur fram: -Soleiðis sum støðan er og soleiðis sum alt gongur fyri seg m.a. í flokkinum, hendir helst ikki nógv annað, enn at fólk uppa øksl. Tað tykist ikki, sum nakað maðurin ger ella sigur, skal fáa avleiðingar. Tí tók tingmaðurin og skrivaði løgmanni bræv um atburðin hjá landsstýrismanninum. Finnur Helmsdal er eisini sera bersøgin tá hann umrøður rikna politikkin: -Í føroyskum politijkki eru hugtøk sum maktgirdn og einaræðislyndi komin í hásæti.